

## So fór gullið til EB/Streym

**Teir komu so syndarliga nær í 2006, áðrenn alt endaði við gráti og tannagrísli á Mølini, men nú eydnaðist tað umsíðir. EBStreymur vann í oktober sítt fyrsta FM-heitið í mansfótbólti, og saman við sigrinum í steypakappingini, gjørdist tað til eitt rimmar ár hjá felagsliðnum.**

**Seinasti leikdagurin hepnaðist tíverri ikki so væl. Ódnarveður var kring landið, og dystir vóru avlýstir. Men lagið var gott í Streymnesi og á Eiði, har gullveitslan varð hildin.**



# Lundin droymir um Føroyar

**Føroysk kvinna gifti seg við drápsmanninum Peter Lundin, kom í andglettin í bæði Føroyum og Danmark, og vildi so skiljast. Peter Lundin fór at droyma um at búseta seg í Føroyum**

Drápsmaðurin Peter Lundin hevur í fleiri ár verið afturvendandi forsíðusøga í Danmark, men nú kom hann eisini til Føroya - á ein hátt.

Tað kom á allar forsíður í Danmark, tá ið Peter Lundin gifti seg í fongsli í Danmark. Ein ung kvinna hevði sagt ja til deila lívið við ferfaldað drápsmannin, til deyðin tey skilti. Og tá Sosialurin so prikaði hol á føroyska vinkulin av søguni, fór lavinan á rull í Føroyum eisini.

Unga havnarkvinna Mariann Poulsen hevði í fleiri ár samskift við Peter Lundin, og ein dagin í fongslinum í Horsens gifti hon seg við drápsmanninum.

Men áðrenn nakar kláraði at siga brúdleypskaka, hevði hon broytt hugsan um giftarmálið og vildi skiljast. Mariann steig eisini fram í miðlunum og greiddi frá hendingini.

– Nú síggi eg, at eg havi verið í klørnum á einum ørum psykopati. Síðstu tíðina havi eg verið sum ein fluga í einum lokkaneti, ið eg ikki havi kunnað slitið meg leysa úr, segði Mariann Poulsen millum annað.

### Vil flyta til Føroya

Peter Lundin hevði eftir øllum at døma fingið eitt gott inntrykk av Føroyum, tí nakað eftir skilnaðin frá Mariann Poulsen kom eitt bræv inn á redaktiónina hjá Sosialinum.

Øll á redaktiónini spílaðu eyguni upp, tá undirskriftin stóð greið. Brævið var frá Bjarne Skounborg/ Peter Lundin.

- Jeg skriver til Sosialurin mht. at etablerer en dialog. Jeg ved jo ikke hvem der er den rigtige person/journalist til at skrive til, så jeg anmoder herved at Sosialurin kontakter mig. Jeg mener at jeg er blivet misforstået og derfor fortjener chancen til at forklare/ forsvare mig. Altså, når jeg bliver løsladt i nogle (få) år, så kan jeg jo ikke bare komme hjem til Færøerne (når alle er i mod mig!) ...jeg elsker Færøerne og det er mit nye hjem. Jeg håber vi kan etablerer en dialog MVH... Bjarne Skounborg/Peter Lundin.

Síðani er samskiftið millum blaði- og Lundin steðgað, og einki hevur verið at hoyrt frá Peter Lundin aftur. Mariann Poulsen er skild frá honum og sigur seg hava tosað við hann fyri seinastu ferð.

## Føst í elevatori

Ein sunnunátt í oktober fingu nøkur fólk, sum vóru farin í býin í Havn, eina øðrvísi upplivingu. Tey vóru farin í elevatorin í Havnar Klubba, og elevatorin steðgaði. Sløkkiliðið varð boðsent at fáa fólkini úr elevatorinum aftur. Í okkurt um tjúgu minuttir stóðu gestirnir fastir inni í elevatorinum, áðrenn eitt starvsfólk í Klubbanum fekk latið hurðina upp og hjálpti gestunum út aftur. Hetta varð áðrenn sløkkiliðið kom á staðið.

## Neyðugt við dómara



**Fíggjarheimurin hevur virkað uttan nakrar avmarkingar, og avleiðingarnar kosta nú milliardir av krónum, heldur Svend Auken, ein av royndastu politikarunum í Danmark, sum var á ferð í Føroyum.**

**– Mín vón er, at vit koma styrkt út í hinum endanum - framvegis við einum fríum marknaði, men nógv meira skipaðum. Higartil hava vit spælt fótbólt uttan dómara, linjuverjar ella strikur á vøllinum, har tann mest harðrendi fór avstað við sigrinum. Framyvir skulu vit hava ein vøll, sum er greitt uppmerktur, við dómara og linjuverjum, sum kunnu døma og geva gul og reyð kort, sigur Svend Auken við Sosialin.**

## Flóvir av Politistøðini

Jan Poulsen, sum er formaður í Politistafelagnum, er sera harmur um, hvussu viðurskiftini á landsins størstu politistøð eru. Viðurskiftini eru so galin, at arbeiðsfólkini skammast av tí.

– Ofta fara fólk inn í garðin, har tey onki hava at gera, tí høvuðsinngongdin er so óinnbjóðandi, at mann følir seg kriminellan, um mann kemur inn tann vegin, fortelur Jan Poulsen, sum eisini heldur, at bygningurin sær meira út sum ein hernaðarleivd enn ein politistøð.

Politiovastin sigur, at ábøtur eru á veg.

» **Vit hava øll tikið lut í stóru illusjónini. Tað hevur verið sum at liva í einum Hollywood filmi. Alt hevur verið blást upp, serliga í miðlunum, og politikararnir hava bara latið staðið til.**

Fríðrik Brekkum, íslendskur vinnulívsmaður

» **Tað krevst ein góð porsjón av idealismu at reka eina slíka kristiliga sjónvarpsstøð sum Iktus. Men hesa idealismuna eiga vit, og vit íðin til brots í dag.**

Anja Hansen, programleiðarin á Iktus